# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Olivur Holm 90 ár

2. hvítusunnudag 28. mai verður Olivur Holm, vanliga nevdur Olivur við Bakkhús, níti ár.

Olivur er sonur Annu av Steig úr Sandavági og Danjal Olivur Holm av Hólalagi í Hvalba.Tey settu búgv við Bakkhús og fingu 12 børn. Olivuri untist at hava seks beiggjar og fimm systrar.

Olivur fann sær konu úr Nesi. Hann giftist við fastur míni Meinu, sum er dóttur Jacob og Annu Kathrinu Ludvig.Tað er á henda hátt, at eg sum smágenta kom at kenna henda fitta og blíða mannin. Ávísa tíð á árinum kom Olivur út í Nes at velta og at hoyggja. Tað eru hugnarligar løtur at minnast aftur á, tá hann vitjaði inn til okkara til ein døgurðabita ella ein drekkamunn. Olivur hevur altíð dugað sera væl at siga frá og við síni níti ára gomlu lívssøgu, so er tað so ófatuliga nógv, ið hann hevur havt at geva okkum yngru.



Olivur hevur verið sjómaður stóran part av lívinum, eisini hevur hann arbeitt nógv á kolinum. Seinastu nógvu árini róði hann út við línubátinum Hamranesi. Sigast má um Olivur, at hann hevur verið ein sera raskur arbeiðsmaður, sum altíð hevur gjørt sítt arbeiði til lítar - bæði á sjógvi og landi.

Olivur hevur altíð havt stóran áhuga fyri vøkru náttúru okkara. Alskin til Lítla Dímun var honum í blóðið borið. Hann var í síni tíð ein av undangongumonnunum, sum altíð var til dystin fúsur at fara út í oynna. Olivur er takksamur fyri og stóltur av, at unga ættarliðið hevur tikið við, har hann sjálvur slepti.

Nú árini eru komin, býr Olivur í Eldrasambýlinum, og har er hann glaður fyri at vera. Hann er raskur at ganga sær ein túr út í Skálar at vitja konuna Meinu, sum altíð hevur verið honum ein hollur stuðul.

Olivur og Meina eiga tvær døtur, sum búgva í Havn. Tey eiga seks abbabørn og trý langabbabørn. Tey eru øll røsk at vitja suður, og hetta eru familjuløtur, sum Olivur og Meina gleast um.

Góði Olivur, eg og vit øll á Sýnini ynskja tær hjartaliga tillukku á 90 ára føðingardegnum. Vit takka fyri hugnarligar løtur, hjálpsemi og blíðskap - tá vitjað verður í Skálum. Má Harrin styrkja teg í tíðini sum kemur og takk fyri alt, sum tú hevur verið fyri okkum.

**Súsanna**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hjørdis í Jansagerið**, ættað úr Miðvági, búsitandi í Hørning, andaðist 22. mai á Silkeborg sjúkrahúsi, 67 ára gomul.

**Svanhilda Olsen**, vanliga nevnd Hilda, av Toftum, andaðist 22. mai 89 ára gomul. Kistan kemur í Fríðrikskirkjuna fríggjadagin 25. mai klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni leygardagin 26. mai klokkan 14. Tey ið vilja minnast Hildu, kunnu geva eina gávu til missiónshúsið Tabor á Toftum, konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði maður, pápi, sonur, versonur og beiggi

**Marnar Fríðrikur Dam**
Oyndarfjørður

andaðist 21. mai, 36 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Oyndarfjarðar kirkju leygardagin 26. mai kl. 14.00

**Leila, Irena, Jónleyg**
**Edith, Andrias, Poulina, Jónhard**
**og systkin við familju**

Tey, ið vilja minnast Marnar við blómum ella kransi, kunnu lata eina peningagávu til genturnar. Konta í Eik banka

Færøernes Mellem- og Realskole:

# Millumskúlabørn umleið 1943

Í sambandi við eina framsýning sum verður á ólavsøku í ár í gamla realskúlanum í Havn leitar Jórunn Dánialsdóttir eftir myndum av lærarum og næmingum í "Færøernes Mellem- og Realskole" í tíðarskeiðnum 1916 til 1966.

Jórunn heitir á tey, sum eiga myndir frá hesum tíðarskeiði, um at ringja til sín á tel. 316024 ella 226024. Adressan er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

Tíðarfreistin er sett til 10. juni, og vónar Jórunn at fáa allar myndirnar til høldar til tað tíð.

Í dag hava vit mynd av fýra børnum í 2. millumskúlaflokki umleið 1943, f.v.: Poul Mohr, Karl Vilhelm Fosså, Sonja Egholm (g. Danielsen) og Arne Berg Jacobsen.

Flokkurin, sum hesi børnini gingu í, fóru í millumskúlan í 1940 og vórðu liðug í 1945. Tey gingu sostatt í skúlanum øll krígsárini.

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í sambandi við hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við Jórunn Dánialsdóttir.

*Myndaeigari: Ingibjørg Djurhuus*



**Dagurin**

**25. mai. Urbanus.** Hann var Pávi, til hann varð hálshøgdur ár 230. Eftir teimumgomluálmannakkunum var Urbanus fyrsti summardagur. Navnið merkir upprunaliga býarbúgvi.

